# Fittar grýlur í Birkilund

**Í góðveðrinum í dag eru nógvar grýlur sæddar kring landið. Í nógvum skúlum sláa tey tunnu í dag, meðan tey hava frí í morgin. Í øðrum skúlum slóu tey tunnu fríggjadagin, og so hava tey frí í dag.**

**Dagstovnarnir í Havn hava opið í dag, og har eru rættiliga nógvar grýlur at síggja.**

**Myndamaður okkara var framvið í Barnagarðinum Birkilund - sum fyrr kallaðist Konmansmýra, og tók hesar myndirnar av fittu grýlunum í barnagarðinum.**

**So í kvøld er bert at minnast til at fylla krukkurnar við góðgæti til grýlurnar koma á gátt í kvøld!**














# »Ongin kann gita hvat eg fari at syngja«



**Tað verður ein heilt øðrvísi Anna Nygaard, sum verður at síggja á skíggjanum fríggjakvøldið. Fyrireikingirnar til næstu beinleiðis framførsluna eru ígongd, men Anna vil ikki avdúka hvør sangur talan er um**

TÓNLEIKUR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

– Tað kennist fantastiskt at verða komin víðari í kappingini, men nú er næsta framførsla longu á skránni, sigur Anna Nygaard úr Keypmannahavn.

Fríggjakvøldið var hon ein av teimum átta, sum sluppu víðari í X Factor.

Anna, í reyðum kjóla, kendi seg avbera væl á pallinum, og sást tað eisini aftur í framførsluni.

– Vit eru eitt stórt toymi, ið samstarva um, hvat vit skulu vera í og síggja út. Eg havi sjálvandi síðsta orðið, greiður Anna frá.

## Nógvan stuðul

Anna fær nógvan stuðul, bæði frá dønum og føroyingum. Nógv skriva inn á hennara heimasíðu, og Anna er kedd um, at hon ikki nær at svara øllum.

– Tað vermur virkuliga at lesa, hvat fólk skriva. Serliga tá føroyingar skriva, kennist tað sum mín egna familja, sigur Anna.

Hon gleðir seg til framførsluna fríggjakvøldið.

– Nú veit eg betri, hvussu eg skal gera á pallinum, og tí kann eg betri konsentrera meg um sangin, sigur hon.